PJ y

# Semja

# millum

# Fíggjarmálaráðið

# og

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. januar 2023 – 31. desember 2025. Semjan byggir á ein karm svarandi til 3,8 %, 4,2 % og 4,75 % yvir trý ár. Harumframt verður eitt serstakt lønarlyft á kr. 475 um mánaðin givið frá 1. januar 2024.

**Lønarhækkanir:**

Tann 1. januar 2023 mánaðarlønirnar 3,80 %

Tann 1. januar 2024 hækka mánaðarlønirnar 4,2 % umframt kr. 475

Tann 1. januar 2025 hækka mánaðarlønirnar 4,75 %

**§ 1**
Reingerðarteknikari verður lagt afturat sáttmálaøkinum.

**Viðbøtur í lønartalvuni**
Frá 1. januar 2023 verða viðbøturnar í lønartalvuni ásettar sum prosentpartur av mánaðarlønini á stig 5. Viðbøturnar, ið talan er um, eru: seingjareiðingardeild (2,04 %), eftirútbúgving í reinføri m.a. (2,04 %), bólkaleiðaraviðbót (4,07 %), viðbót fyri ávísa vaktarskyldu (6,11 %), vandaviðbót (1,22 %).

**§ 12 um barnferð**
Stk. 5 verður broytt til: Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Frá 1. oktober 2024 kunnu hesar 10 vikurnar við løn liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið eftir viku 14. Hetta er galdandi fyri foreldur, hvørs børn eru fødd 1. okt. 2024 og seinni.

**§ 14 um frídagar og halgidagar**
Páskadagur og hvítusunnudagur verða settir inn í § 14.

Í lønartalvuni verður víst á § 14 stk. 5, har ásett er, at arbeiði á sunnu- og halgidøgum, sum ikki eru sunnudagar, verður samsýnt við ½ tíma eyka fyri hvønn arbeiðstíma.

**§ 3 um setanarbræv**
Nýtt stk. 2: Tá starvsfólk hevur fingið setanarbræv skal avrit sendast Havnar Arbeiðskvinnufelag til kunningar.

Tinganes 27. juni 2024

Ruth Vang, Landsstýriskvinna í Fíggjarmálum

Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag

Mariann Højgaard, næstforkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag

Karin Højgaard, nevndarlimur í Havnar Arbeiðskvinnufelag

Óluva Persson, nevndarlimur í Havnar Arbeiðskvinnufelag

Jónveig Arge, nevndarlimur í Havnar Arbeiðskvinnufelag